

Mynd: Harald Pettersen

# Metáhugi at leita eftir olju í danska partinum av Norðsjónum

**Jógvan Hugo Gardar**

21.10.2014 - 11:55

Oljan.fo

Áhugin at sleppa at leita eftir kolvetni í danska partinum av Norðsjónum er framvegis stórur. Danska orkuráðið sigur í einum tíðindaskrivi at tey hava fingið 25 umsóknir frá 15 ymiskum feløgum, í samband við sjeynda útbjóðingarumfar. Hetta er tað mesta tey hava fingið til eitt útbjóðingarumfar.

Danska stjórnin broytti skattapolitikkin mótvegis oljufeløgunum, og hetta fekk nógv at halda at áhugin vildi minka hjá feløgunum at leita eftir olju og gassi hjá dønum. Men so er ikki.

Danski orkumálaráðharrin, Rasmus Helveg Petersen, sigur í eini viðmerking at hann er sera væl nøgdur við at áhugin er so stórur, og at hann vónar at leitingin kemur at geva áhugaverd úrslit.

Tey fimtan feløgini sum hava víst áhuga og sent umsóknir inn eru úr Danmark, Stórabretland, Hollandi, Týsklandi, Italia og Noregi, og sambært orkuráðnum hava fleiri av feløgunum ikki verið á danska landgrunninum fyrr.

Ætlanin er at loyvini skulu latast fyrst í 2015.